

# Fyribils veiting til uppihalds

almannaverkið

## Hvør kann fáa hjálp?

Í forsorgarlógini stendur, at øll hava skyldu at uppihalda sær og sínum, men at tað almenna hevur skyldu at hjálpa øllum, sum av einihvørjari orsøk eru komin í neyð. Tað skal tó vera ein broyting í tínum viðurskiftum, sum ger, at neyðugt er at fáa fíggjarliga hjálp til uppihalds. Broytingin kann t.d. vera sjúka, arbeiðsloysi, barnsburður, vantandi barnaansing, andlát hjá hjúnafelaga, hjúnaskilnaður ella líknandi almannahending.

## Nær kann hjálp veitast?

Fyribils veiting kanst tú fáa, tá tú ikki sjálvur er førur fyri at útvega tær pening, sum er neyðugur til títt egna og familjunar uppihald. Tú hevur tá ikki ein hjúnafelaga, ið er førur fyri at uppihalda tær, og tú hevur ikki ogn, inntøku, tryggingar ella annað, sum tú kanst liva av.

Endamálið við hjálpini er at hjálpa tær burtur úr fíggjarligu trongstøðuni, sum er íkomin, tí tú fyribils onga inntøku hevur.

### Viðíkjandi ogn

Um tú ella hjúnafelagin eiga reiðan pening, pening á kontu í peningastovni, lætt umsetiliga ogn so sum partabrøv ella ognir, sum við sølu kunnu geva pening at liva fyri, kannst tú ikki fáa hjálp. Sethús, sum tú sjálvur býr í, telja ikki við sum ogn í hesum høpi. Undantaksvís kann ein minni ogn varðveitast, um tað kann skjalprógvast, at hon er uppspard til bústaðar-, vinnu- ella útbúgvingarendamál hjá tær ella familjuni.

### Sjúka

Ert tú í einari støðu, har tú hvørki hevur rætt til løn undir sjúku ella sjúkradagpening, er møguligt at fáa uppihaldshjálp.

### Arbeiðsloysi

Ert tú blivin arbeiðsleysur, er tað fyrst og fremst Arbeiðsloysisskipanina (ALS), tú skalt venda tær til. Allir løntakarar eru tryggjaðir í ALS. Sí nærri á www.als.fo.

Hevur tú ikki havt inntøku áðrenn, til dø- mis tí tú hevur verið í útbúgving og onki arbeiði hevur fingið eftir lokna útbúgving, kanst tú søkja um fyribils veiting. Kemur tú ikki longur undir reglurnar hjá ALS, er somuleiðis møguligt at søkja hjálp frá Almannaverkinum Tú kanst eisini í ávísum førum søkja um ískoyti til veitingina frá ALS.

### Barnsburður

Í sambandi við barnsburð er tað í fyrsta lagi Barsilsskipanina, tú skal venda tær til. Sí nærri á www.barsil.fo. Í heilt serligum førum kanst tú fáa sjúkradagpengar frá Almannaverkinum. Tað er, um tú arbeiðir á einum arbeiðsplássi, har vandi er fyri at skaða heilsuna hjá tær ella ófødda barninum.

Um tú av einihvørji orsøk ikki hevur rætt til útgjald frá Barsilsskipanini, til dømis tí tú ikki áður hevur havt arbeiðsinntøku, kanst tú søkja um fyribils veiting frá Almannaverkinum.

Tú kanst eisini í ávísum førum søkja um ískoyti til veitingina frá Barsilsskipanini.

### Vantandi barnaansing

Fær tú ikki títt barn ansað í dagstovni ella dagrøkt og tí fær fíggjarligar trupulleikar av ikki at sleppa til arbeiðis, kanst tú venda tær til Almannaverkið at kanna, um tú hevur møguleika fyri at fáa fyribils veiting, meðan tú bíðar eftir ansingarplássi.

### Slit av samlívi við hjúnafelaga ella sambúgva

Er tú komin í fíggjarliga neyð, tí tú og hjúnafelagin ella sambúgvin eru farin hvør frá øðrum, ella tí hjúnafelagin er deyður, kanst tú søkja tær hjálp og vegleiðing frá Almannaverkinum.

### Onnur hending, ið hevur við sær fíggjarligar trupulleikar

Tað kunnu vera aðrar broytingar í tínum sosialu viðurskiftum, ið hava við sær, at tú fær brúk fyri fíggjarligari hjálp og vegleiðing frá Almannverkinum. Tá ber til at venda sær til Viðskiftadepilin í Almannaverkinum og hoyra um møguleikarnar at fáa hjálp.

## Veitingarupphæddin

Veitingin sum tú fær, er ein føst lógarásett upphædd, sum er skattskyldug.

Fasta upphæddin er ásett eftir um tú er:

- yngri enn 25 ár ella um tú er 25 ár ella eldri,
- um tú býr einsamøll/einsamallur ella um tú er sambúgvandi, og
- um tú hevur børn at forsyrgja ella ikki.

Um serlig viðurskifti gera seg galdandi hjá tær, so er møguligt at fáa eitt ískoyti til ásettu veitingina, t.d. til bústaðarútreiðslur.

Allar inntøkur hjá tær verða mótroknaðar í veiting eftir forsorgarlógini. Partar av inntøkuni hjá møguligum hjúnafelaga verða somuleiðis mótroknaðar í veitingini.

Um tú fær játtað fyriskipan við arbeiðsbúgving, so hækkar tín veiting.

### Virknisviðbót

Í tíðarskeiði, har tú luttekur í virknisvenjing á einum almennum ella privatum arbeiðsplássi, fær tú umframt veiting eftir forsorgarlógini eisini eina virknisviðbót á 1.000 kr. um mánaðin, sum ikki er skattskyldug.

| Skattskyldugar veitingar pr. 1. jan. 2014 | um mðr. |
|---|---|
| Forsyrgjaraskyldu mótvegis børnum – búgva einsamøll | 14.421 kr |
| Forsyrgjaraskyldu mótvegis børnum – sambúgvandi | 11.216 kr. |
| 25 ár og eldri, uttan børn – búgva einsamøll | 12.017 kr. |
| 25 ár og eldri, uttan børn – sambúgvandi | 8.012 kr. |
| Yngri enn 25 ár, uttan børn – býr ikki hjá foreldrum | 6.409 kr. |
| Yngri enn 25 ár, uttan børn – býr hjá foreldrum | 2.083 kr. |

# Fá meira at vita

Vilt tú hava meira at vita um møguleikarnar, kanst tú seta teg í samband við Viðskiftadepilin hjá Almannaverkinum:



**Almannaverkið**
Viðskiftadepilin
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
FO-110 Tórshavn

Tlf. 36 00 00 · Faks 36 00 01
av@av.fo · www.av.fo

## Viðskiftadepilin Norðoyggjar

Klaksvíksvegur 78A, FO-700 Klaksvík

## Viðskiftadepilin Eysturoy

Heiðavegur 57, FO-610 Saltangará

## Viðskiftadepilin Tórshavn

Smyrilsvegur 20, FO-110 Tórshavn

## Viðskiftadepilin Suðuroy

Sjógøta 3, FO-810 Tvøroyri

almannaverkið

Dagført februar 2014